

**Jógvan Arge,**
*Formaður í mentamálanevndini í Havn*

# Til reiðar til Oyggjaleikir

*Formaðurin í altjóða oyggjaleikanevndini IIGA hevur verið í Føroyum og kannað eftir, um Ítróttasamband Føroya og føroyskir myndugleikar eru sinnað at taka Oyggjaleikirnar upp á seg aftur*

Álendingurin Jan Pettersson hevur allastaðni møtt áhuga og vælvild, so hann ivast ikki í, at í Føroyum er undirtøka fyri ynskinum hjá ÍSF at standa fyri Oyggjaleikum aftur.

Tað eru góð tíðindi, at Ítróttasamband Føroya aftur liggur framvið at skipa fyri Oyggjaleikunum. Ikki minst eftir, at Føroyar fyri fyrstu ferð vóru bestar av øllum á seinastu oyggjaleikum.

Tað er onki dulsmál, at undir summum av teimum byggingum, sum eru gjørdar í Havnar Kommunu á ítróttarøkinum seinastu árini, hevur eisini ligið hugsanin at gera Føroyar og Havnina før fyri at verða vertur fyri Oyggjaleikum.

Í so máta hava vit tikið risafet við nýggju og vælumtóktu breytini til frælsan ítrótt á Hálsi og nýggju stásiligu fimleikhallunum í Gundadali.

### Golfvøllur neyðugur

Harvið er ikki sagt, at vit lúka allar treytir í dag, men byrðan er ikki so tung at lyfta, sum hon var fyri bara fáum árum síðani.

Vit mugu gera okkum greitt, at golfvøllur má og skal koma. Tað verður trupult hjá okkum at fáa undirtøku millum hini oyggjasamfeløgini uttan golfvøll. Her er also høvið at taka takið fyri golfvøllinum, sum eina ferð skal takast.

Skilji á lagnum, at raksturin av golfvølli nýtist ikki at verða trupulleikin, men fleiri góðar kreftir, hvørjar tær so verða, eiga at samstarva um íløguna.

Innan summar greinar í skjóting og tennis og t.d. squash verða vit ikki hildin at standa frammarlaga, men tað eru eisini umstøður, sum tað ber til at bøta væl og virðiliga um við tí skotbrái, sum er til leikirnir kunna verða í Føroyum.

Gistingin hevur ofta verið søgd at vera grundin til, at vit ikki kundu bjóða okkum fram aftur til Oyggjaleikirnar. Nú eru boðini, at okkum nýtist ikki at hava hotellsong til hvønn luttakara. Tey kunna saktans klára seg, fáa tey fyri mestapartin skilagott innivist á teimum stóru skúlum, sum nú eru.

### Kappast um leikirnar

Hugurin at skipa fyri Oyggjaleikum er stórur. Bermuda hevur fingið leikirnar í 2013, men kappingin var hørð um OYL 2015. Jersey vann við einari atkvøðu á Gotlandi, eftir at báðir partar høvdu brúkt hópin av peningi at tala fyri seg.

Hetta ørkymlar í altjóða oyggjaleikanevndini. Verður hetta lagið frameftir, kann tað elva til spjaðing. Tí hevur formaðurin hug til at leggja leikirnar fastar longur fram í tíðina.

Her er tað, Føroyar hava fingið møguleikan at koma ítøkiliga á skránna. Ætlanin er at arbeiða fyri, at Gotland fær leikirnar í 2017. Menorka í Miðjarðarhavinum verður hildið at liggja væl fyri í 2019, men í 2021 skuldi góður møguleiki verið fyri, at leikirnar verða aftur í Føroyum.

Tað eiga vit at taka væl ímóti. Vit eiga ikki bara at frøast um at sleppa av landinum at kappast. Vit mugu eisini taka upp á okkum at skipa fyri á heimavølli. Tað er ein sjálvsagdur partur av altjóða luttøkuni.

Og tað er ein stór uppliving fyri øll í Føroyum!

# Formansskifti í Kommunusamskipan Føroya

*Sum avtalað í byrjanini av hesum valskeiðinum hevur í dag verið formansskifti í Kommunsamskipan Føroya. Komandi tvey árini verður Gunnvá við Keldu formaður og Heðin Mortensen næstformaður í felagnum*

Á stýrisfundi í Kommunusamskipan Føroya í dag 21. januar, hevur Gunvá við Keldu tikið við sum nýggjur formaður eftir Heðin Mortensen

Tá ið sitandi stýrið í Kommunusamskipan Føroya tók við í januar 2009, var Heðin Mortensen afturvaldur formaður fyri Kommunusamskipan Føroya, og Gunvá við Keldu varð vald sum næstformaður. Samstundis varð avtalað, at næstformaðurin, tá skeiðið varð hálvrunnið, skuldi taka við formanssessinum. Nú valskeiðið hjá kommununum er hálvrunnið, er hetta skiftið í dag farið fram.

Heðin Mortensen hevur, nú hann fer frá, sitið sum formaður í KSF í nærum 5 ár, og er sostatt tann formaðurin, sum hevur sitið longst í formanssessinum.

Tað vóru Tórshavnar, Klaksvíkar, Runavíkar Tvøroyrar, Fuglafjarðar og Vágs kommuna, sum stovnaðu Kommunusamskipan Føroya á aðalfundi 10. juni 1999. Í íbúgvaraumboðan er Kommunsamskipan Føroya vaksið nógv hesi árini fyrst og fremst gjøgnum kommunusamanleggingar, og 1 januar 2007 gjørdist Sands kommuna tann sjeynda limakommunan í felagnum.

Hesi seinastu árini er virksemið hjá Kommunsamskipanini vaksið nógv. Aðalmálið hjá Kommunusamskipanin er at verja og virka fyri felags áhugamál hjá kommununum og at styrkja kommunala sjálvræðið. Kommunusamskipan Føroya hevur verið við til at stovna og fíggja millumkommunalu stovnarnarnar Kommunala Arbeiðgevarfelag Føroya og Barnaverndastovu Føroya, eins og Kommunusamskipanin í dag er við til at reka og fíggja samstørv og verkætlanir, sum til dømis undirvísngarportalin, Listaleypin, eins og felagið nýliga var við til at stovna SSP samstarvið.

Í løtuni fyrireikar Kommunusamskipan Føroyar seg til limaskap í "Council of European Municipalities and Regions", ið er størsti felagsskapurin í heiminum fyri regionalar og kommunalar myndugleikar.

Kommunusamskipan Føroya heldur til í KSF húsinum í Tórshavn, saman við Kommunala Arbeiðgevarafelag Føroya, Barnaverndarstovu Føroya og SSP samstarvinum.

Nú Gunnvá við Keldu tekur við, verður hon fimti formaður í søgu felagsins. Teir, ið hava sitið undan henni eru

### Formenn

Jákup Lamhauge 1999-2000
Jógvan Krosslá 2001-2004
Rodmundur Nielsen 2005-2006
Heðin Mortensen 2006-2011
Gunvá við Keldu 2011-

Gunvá við Keldu hevur verið borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu hetta valskeiðið. Gunvá varð fyrstu ferð vald inn í Klaksvíkar Býráð fyri valskeiðið 2004-2008. Hon er útbúgvin grafonom og hevði í eitt áramál rikið sína egnu fyritøku, tá hon frá ársbyrjan 2009 tók við sum borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu.



Nú Gunvá við Keldu verður formaður í Kommunsamskipan Føroya, verður hon samstundis eisini við í leiðsluni av Barnaverndarstovu Føroya. Heðin Mortensen verður frameftir næstformaður í Kommunasamskipanini og heldur áfram sum formaður fyri Kommunala Arbeiðgevarafelagið.